UTTAN ÚR HEIMI



Mahmoud Ahmadinejad: Tey oljuframleiðandi londini fáa alt ov lítið burtur úr tí høga oljuprísinum

Mynd: Reuters

# Oljan er ov bílig

**Tað eru ídnaðarlondini og ikki oljulondini, sum gera kvetti, nú oljuprísurin er so høgur, sigur iranski forsetin**

OLJA
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Hóast oljuprísurin er komin upp ímóti 74 dollarum fyri tunnuna, vísir tað framvegis ikki, hvussu nógv oljan í veruleikanum er verd, og tað eru ikki tey oljuframleiðandi londini, sum fáa vinningin.

Tað sigur iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, sum enn einaferð hevur sína ávarandi hond á lofti, nú altjóða samfelagið herðir trýstið á Iran fyri at fáa landið at gevast við sínum kjarnorkuætlanum.

– Oljuúrdráttir verða seldir fyri prísir, sum eru tíggjutals ferðir hægri enn tað, sum tey oljuframleiðandi londini fáa. Tað eru harafturímóti ídnaðarlondini, sum fara við pengunum, sigur Ahmadinejad við iranska útvarpið. Kanadiski marknaðarserfrøðingurin Fadel Gheit gevur iranska forsetanum rætt. Hann sigur við AP, at oljuprísurin er tríggjar ferðir hægri enn tað, sum OPEC-londini fáa burturúr, og tí eru tað tey vesturlendsku oljufeløgini, sum fara við tí stóra vinninginum, sigur Fadel Gheit, sum starvast hjá kansiska íløgubankanum Oppenheimer & Co.

Í samrøðuni við iranska útvarpið segði Mahmoud Ahmadinejad, at tey oljuframleiðandi londini eiga at stovna ein oljugrunn, sum skal hjálpa teimum fátæku menningarlondunum, sum noyðast at innflyta olju.

Hinvegin nevndi hann ikki trætuna um kjarnorkuætlanina við einum orði, men hann hevur fyrr hótt við at steðga iranska oljuútflutninginum, ger umheimurin álvara av hóttanini um tiltøk ímóti Iran. Iranar útflyta 2,5 milliónir tunnur av olju um dagin, og ein steðgur kann fáa álvarssamar avleiðingar.

Iranskir politikarar hava eisini hótt við at taka eitt annað stig, sum kann fáa uppaftur álvarssamari avleiðingar. Herfyri ávaraði innanríkisráðharrin um, at Iran hevur eftirlitið við Hormus-sundinum, sum øll oljan úr Persaflógvanum fer ígjøgnum, og at landið er til reiðat at steingja sundið, gerst tað neyðugt.

# Hann skrivaði undir

Undir rættarmálinum í Bagdad hevur fyrrverandi irakski forsetin Saddam Hussein hildið uppá, at tað var ikki hann, sum skrivaði undir deyðadómarnar hjá 148 shiamuslimum, sum blivu avrættaðir í 1984, eftir at teir høvdu sett seg upp ímóti stýrinum.

Men nakrir serfrøðingar, sum hava kannað skjølini og undirskriftirnar, eru ikki í iva um, at tað var Saddam, sum skrivaði undir. Teir siga, at fyrrverandi forsetin skrivaði undir boðini um at avrætta 148 shiamuslimskar menn og dreingir í bygdini Dujail í 1984, og at fleiri hundrað onnur skuldu setast í fongsul. Sambært serfrøðingunum skrivaði hann eisini undir eitt skjal tvey ár frammanundan, har hann kravdi, at fleiri húski í Dujail skuldu missa jørðina.

Verjarnir hjá Saddam Hussein góðtaka ikki frágreiðingina hjá serfrøðingunum.



Saddam Hussein, Skrivaði hann undir deyðadómarnar?

Teir vísa á, at serfrøðingarnir starvast hjá núverandi stjórnini í Bagdad, og at teir tí eru ógegnigir.

# Selja gøgn úr fangum

**Felagið hjá bretskum skurðlæknum skuldsetir Kina fyri at selja ymisk gøgn úr avrættaðum fangum**

KINA
Árni Joensen:
fartekst@mail.dk

Bretsku skurðlæknarnir vilja vera við, at gøgnini verða tikin og seld uttan tilsøgn frá fangunum ella teirra avvarðandi. Skurðlæknin Stephen Wigmore sigur við BBC, at ofta verða gøgnini seld so skjótt, at leiðslurnar í fongslunum mugu hava valt tann rætta fangan burturúr longu frammanundan.

Fleiri mannarættindafelagsskapir hava leingi lagt Kina undir at taka gøgn úr avrættaðum fangum við sølu fyri eyga, og bretska skurðlæknafelagið er heldur ikki í iva um, at kinesiska framferðin er í stríð við altjóða mannarættindini. Sambært Stephen Wigmore eru prógvini sum umfatandi, at okkurt má gerast við málið.

Kinesisku myndugleikarnir avsanna, at teir taka gøgn úr fangum fyri at fáa pengar vinning burtur úr teimum, og í síðsta mánað kunngjørdi stjórnin í Beijing, at hon hevði gjørt av at steðga øllum handli við gøgnum.

Stephen Wigmore sigur við BBC, at kinesiski handilin við gøgnum er vorðin ein liður í landsins ferðamannavinnu. Á hvørjum ári fara fólk úr Vesturheiminum, Japan og Suðurkorea til Kina at ferðast, tí har kunnu tey samstundis fáa nýggj gøgn, sigur hann.




**8 ógloymandi dagar í Suðuronglandi...**
...við spennandi útferðum hvønn dag. Vit kunnu t.d. nevna:

Fríggjadag 14. juli, koma til Stansted, koyra við bussi gjøgnum Hampshire umvegis Winchester til Plymouth, har gist verður.

Leygardagin 15. juli verður farið til St Austell, har hugt verður eftir tí undrunarverda Eden Project. Seinnapartin verður farið víðari til Lanhydrock, einaferð nevnt tað fínasta húsið í CornwallKring húsið er ein undurfagur urtagarður.

Sunnudagin 16. juli verður farið ta stuttu leiðina til St Michael's Mount, ið stingur upp úr sjónum við Mount Bay. Vit vitja eisini á Land's End – vestasta tanga í Bretlandi – hvørs baldruta landslag er ógloymandi.

Mánadagin 17. juli fara vit rannsóknarferð til tær fjarskotnu víkirnar og hugnaligu bygdirnar Looe, Polperro og Falmouth.

Týsdagin 18. juli kekka vit út av hotellinum og koyra til Bournmouth gjøgnum Dartmoor National Park. Seinnapartin vitja vit í Exeter.

Mikudagin 19. juli verður farið tíðliga við bussinum á heildagstúr til Bath, Glastonbury and Wells. Vitjað verður síðani í Bath- ein vælkendur heilsubótarbýur.

Hósdagin 20. juli fara vit við ferju yvir um sundið at vitja Osbourne House, summarhúsið hja Drotning Victoriu.

Fríggjadag 21. juli verður koyrt beinleiðis til Stansted har fráferðin er við Atlantic Airways kl. 13.15.
Les meira um ferðina á www.atlantic.fo

**Íroknað ferðina er:**
- Flogferðin við ferðaavgjøldum.
- Innivist á 3-stjørnaðum hotellum við stórum enskum morgunmati.
- Døgurði við trimum rættum hvønn dag.
- Bussur og skandinaviskur ferðaleiðari alla tíðina.
- Allar útferðirnar við atgongugjaldi.

Ikki íroknað: Ferðatrygging, drykkjuvørur og eyka máltíðir.

Kostnaður fyri hvønn í dupultkamari:

**11.898,-**

Eyka kostnaður fyri einakamar:
Kr. 1.575,-

*Depositum kr. 2.000,- verður at gjalda við tilmeldan. Depositum verður afturgoldið, um túrurin verður av ongum.*

*Ferðin er treytað av í minsta lagi 20 ferðandi. Seinasta freist at tekna luttøku er 20. mai.*

ATLANTIC AIRWAYS
Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum
www.atlantic.fo